Í Føroyum nema vit danskar útbúgvingar

Ongin sjálvstøðugur føroyskur tanki er enn settur í verk hvat skúla og útbúgvingarskipan viðvíkur. Tá tjóðveldisflokkurin tvíheldur um, at ein føroyskur skúli er tryggjaður við yvirtøkuni og av uppaftur fleiri skúlum, so er hetta bert enn eitt dømi um veruleikafjara og nationalromantiska politikk teirra, sigur Kristjan á Neystabø, studentaskúlalærari og valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy.

Í einum framkomnum samfelag sum okkara krevja vit at hava ein framkomnan útbúgvingarbygnað, og at kalla allir flokkar hava verið samdir um ta útbygging av framhaldandi skúlunum, ið er farin fram hesi seinastu árini. Tað er eisini at fegnast um, at núverandi samgonga hevur tikið tey fyrstu stigini til eina langtíðarætlan fyri framhaldandi útbygging av føroyska skúlaverkinum.

Tað er tó nógv fyri at niðurstøðan av eini metan av gongdini í føroyskum skúlapolitikki er, at vit framvegis ikki eru komin longur enn til eitt lokalpatriotiskt kjak um fordeiling og plasering av nýggjum skúlum. Tað nyttar ikki at umbera seg við byrjunnartrupulleikum — 10 ár eru um at vera liðin, síðani skúlamál komu á føroyskar hendur.

Hvat innihaldið skal vera í hesum nýggju skúlunum, og hvussu innihald og bygnaður skal vera í teimum gomlu skúlunum er eitt óskrivað blað í føroyskum politikki. ONGIN sjálvstøðugur føroyskur tanki er enn settur í verk hvat skúla og útbúgvingarskipan viðvíkur.

Tá tjóðveldisflokkurin tvíheldur um, at ein føroyskur skúli er tryggjaður við yvirtøkun og uppaftur fleiri skúlum, so er hetta bert enn eitt dømi um veruleikafjara og nationalromantiska politikk teirra.

Mynstrið er danskt

Allar framhaldandi útbúgvingar í Føroyum fara fram eftir danskari fyrimynd. Einasta frávikið er, at vit afturat øllum teimum donsku lærugreinunum hava føroyskt og onkustaðni eitt sindur um fiskivinnu.

Sambært teimum krøvum, ið henda danska skúlaskipanin setir, megna vit ikki at manna skúlar okkara við lærarum, og talið av útlendskum (lesið donskum!) lærarum veksur í hvørju. Fleiri skúlar fleiri danskar lærarar. Sjálvsagt eiga vit at vera takksom, at nakar kemur hendavegin at nøkta okkara tørv. Men útlendskir lærarar, ið oftast hvørki tosa ella skilja føroyskt, í einari danskari útbúgvingarskipan geva ikki okkara næmingum eina útbúgving, ið mennir tey til virknar ábyrgdarfullar og dugnaligar borgarar í hesum landinum.

Innihaldið skal endurskoðast

Vit mugu fara í holt við at endurskoða innihaldið í tí føroyska skúlanum, vit mugu tora at seta krøv um útbúgving og eftirútbúgving av lærarum og tora at slaka viðv. teimum akademisku krøvunum, tá talan er um serstøk føroysk fakøki, ið skulu innum skúlagátt. Vit mugu fram um alt í holt við at framleiða hópin av føroyskum undirvísingartilfari. At enda mugu vit ikki smæðast fyri at nýta hægru útbúgvingarskipan í grannalondum okkara, tá tað snýr seg um tørv á útbúnum serfrøðingum.

Ein vælútbúgvin ungdómur er langt frá bert treytaður av, hvussu leingi hann hevur gingið í skúla. Týdningarmikið er at finna ein fjølbroyttan útbúgvingarbygnað, ið tænir føroyska samfelagnum best.

Politiskar avgerðir mugu til

Tað er nú tíð uppá, at nakrar politiskar avgerðir verða tiknar — tað nyttar ikki at spæla bóltin yvir til embætisfólk og fyrisiting. Hesi fáa ikki arbeitt við ongum politiskum grundarlagi.

Tað er eisini tíð uppá at spyrja, um føroyska samfelagnum tørvar, at 30-40% av einum ungdómsárgangi verða studentar. Ella man kundi vent spurninginum við og spurt: Tá ið 30-40% fara á studentaskúla ella HF-skeið, hvussu laga vit tá hesar útbúgvingar til tað føroyska samfelagið.

At seta hópin av siúlakassum við donskum innmati á stovn afturat, kann bert Tjóðveldisflokkurin uppfata sum góðan skúlapolitikk. — Latið Javnaðarflokkin føroyska skúlan.

Kristjan á Neystabø.

Opið bræv til Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya

Olympisku leikirnir eru av á hesum sinni og ikki kann sigast annað enn, at tær hava verið væl frásagdar, bæði á nátt og degi, ja sjálvt halgidagslógin var væl og virðuliga goymd. Tað varð sent nonstopp leygardag og langt út á sunnudagarnar.

Men lat tað fara á hesum sinni. Gjørd gerð fer onga venda.

Tó verður tað soleiðis í framtíðini, at tað ikki verður gjørdur sami feilur sum hesaferð.

Sjálvt um vit veruliga frøðast um tey góðu úrslit, sum Noreg fekk, bleiv besta landið av Norðanlondum, so hevði tað ikki gjørt sendingarnar verri, um vit av og á fingu eina mynd av teimum donsku úrslitunum, men hetta verður kanska betri næstu ferð.

Um fýra ár er alt tað farna gloymt.

Olympisku leikirnir eru av á hesum sinni, men tó ikki heild, tí tann 8/10 1988 fara ítróttarfólk úr Føroyum til luttøku á teimum olympisku leiknunum, sum verða fyri brekaðu í Seoul í oktober 1988.

At vit her eru væl umboðað er eingin loyna. Vit hava luttikið í mongum kappingum og fingið sera góð úrslit. At vit fáa góð úrslit við hesar Olympisku leikirnar er væl eingin ivi um, men sjálvt um úrslitini ikki vera so góð sum vit ynskja, so eru vit har, okkara ítróttarungdómur umboðar okkum við merkinum á odda.

Bara hetta er í sjálvum sær ein stór hending, ein hending, sum bert fyri nøkrum fáum árum síðani vildi verið ógjørlig.

Tað er at vóna, at Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya fara at vísa hesari føroysku luttøku eins stóran áhuga, ja meira, enn tann sum nú er farin í

søguna.

Vit vænta sendingar frá teimum olympisku leiknunum fyri brekað á sama støði sum tann, ið nú er av. Vit hava meira krav nú, tí hesaferð er tað okkara egnu sum luttaka.

At enda til tykkum sum fara, góða eydnu.

Sverre Midjord

Drív á, Thomas Arabo!

Ikki lukkuligt sum sjálvur sambandsformaðurin og Dagblaðið leika í um greinina hjá Arabo um farmaskipaflotan.

Við nakað av kunnleika til málið, so var greinin eitt plettskot. Tummas man sum fyrrverandi flutningsmaður og núverandi nevndarformaður í P/f Smyril Line vita hvat hann sigur um hatta málið.

Navigatørur

Stak gott nýflett

FØROYSKT LAMBSKJØT

(bert heil krov)

fæst í

Vit hittast í

SMÆRUNI

M.a. Winthersgøta 2
Tlf. 1 15 49 — 1 10 47

»Menning«

Óformelt orðaskifti og upplýsing um Bahá'í sunnukvøldið kl. 8 heima hjá Sue og Roy Philbrow, »Ridvan«, Undir Nesinum, Toftir. Opið fyri ein og hvønn.

Hesa vikuna hava vit ein gesta gestarøðara, Ingelise Sørensen, og evnið verður: »Menning«.

Aðalfundur

Aðalfundur íslendingafelagsins í Færeyjum verður haldinn 22/10 kl. 14.00 í Norðurlandahúsinum.

STJÓRNIN